## Kantatan á fløgu

Á nýggjari fløgu bjóðar Tórshavnar Manskór sína útgáva av Ólavsøkukantatuni frá 1930. Talan er um Ólavsøkukantatuna, ið Mitens og Waagstein hegnisliga smíðaðu til 900 ára ólavsøkuhátíðina í 1930. Kantatan er tikin upp í Vesturkirkjuni. Inngangssangurin í kantatuni er "Fjallprúða heim" hjá R.Effersøe og Nordblom. Eftir inngangssangin koma nøkur speirekandi orð, sum Petur Øster hevur sett saman, og sum Uni Arge ber fram. Síðani kemur sjálv kantatan hjá E. Mitens og J. Waagstein, sum er í 7 pørtum, har seinasti parturin er við solistunum Peter H. Niclasen og Mouritz Mohr. Til seinast er útgangssangurin "Harra Guð títt dýra navn og æra", sum Jógvan Waagstein uppteknaði. Orðini til útgangssangin, upprunaliga eftir Petter Dass, hevur J. Dahl føroyskað. Hetta er fjóðra fløgan hjá Tórshavnar Manskóri. Tutl gevur út.



*Á nýggjari fløgu leggur Tórshavnar manskór millum annað røddir til Ólavsøkukantatuna, sum Mitens og Waagstein smíðaðu til 900 ára ólavsøkuhátíðina í 1930*

# 40.000 í bót fyri at blaka tosk útaftur

**Skiparin á trolaranum Haki, sum JFK Trol eigur saman við øðrum, hevur fingið bót fyri brot á tær grønlendsku fiskiveiðireglurnar**

FISKIVINNA

*Árni Joensen*
*arni@sosialurin.fo*



Eftirlitsmenn frá danska vaktarskipinum Ejner Mikkelsen staðfestu í síðstu viku, at óskil var í veiðidagbókini hjá trolaranum Haki, sum royndi í víkini í Vesturgrønlandi. Eftirlitsmenninir komu eftir, at skipið hevði blakað meiri tosk útaftur, enn tann føroyski skiparin hevði skrivað í dagbókina. Harafturat vísti tað seg, at skipið hevði fiskað og virkað fisk, sum var minni enn tað loyvda minstamátið. Skiparin fekk eitt sektaruppskot, sum var 40.000 krónur, og tað góðtók hann.

*-Tann lági toskaprísurin er einki minni enn ein katastrofa, sigur Hanus Hansen, reiðari á Haki*

Sambært Hanusi Hansen, stjóra á JFK Troli, hevði manningin á Haki lítið annað í at velja enn at blaka fisk útaftur. Frá skiparanum, Ásmundi Olsen, hevur hann fingið at vita, at teir fingu umleið 40 tons av toski eftir nøkrum fáum minuttum. Nógv smátt var uppií, og teir gjørdu av at blaka millum fýra og fimm tons útaftur. Tað vildi eygleiðarin, sum er umborð, ikki góðtaka og varskógvaði fiskiveiðieftirlitið.

Haki er fyrrverandi Fuglberg. JFK eigur skipið saman við grønlendska felagnum Arctic Prime Fisheries, sum JFK eigur saman við øðrum, og tveimum øðrum grønlendskum feløgum. Hesi trý feløgini fingu í vár 51 prosent av teirri grønlendsku toskakvotuni, sum skal veiðast uttanskers.

Haki roynir eftir toski og svartkalva. Hanus Hansen sigur, at fiskiskapurin hevur verið brúkiligur, men at prísurin á toski er so vánaligur, at tað sambært reiðaranum er ein katastrofa. Harafturat er nógvur smáfiskur uppií. Fiskurin verður skráskorin og frystur umborð.

Sjey føroyingar eru við Haki. Hinir eru grønlendingar.




*Tulkingarnar av hugtakinum »landslag« reika víða á ársins Ólavsøkuframsýning*

# Rimmar ólavsøkuframsýning

**Við 90 verkum hjá 30 listafólkum verður Ólavsøkuframsýningin í ár tann største higartil**

LIST

*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Verkini eru øll tulkingar av hugtakinum »landslag« í breiðastu merking. Herfyri flutti Grafiski Verkstaðurin úr Listaskálanum, sum harvið fekk munandi størri framsýningarhøli. Gott pláss er tí eisini at hýsa teimum mongu og samansettu verkunum, sum verða við á Ólavsøkuframsýningini í ár.

Millum tey 90 listaverkini, sum eru við, eru málningar, foto- og steintoysverk, standmyndir úr sandsteini, stáltráði, pappíri, innstallatiónir og verk úr aðrari samansettari tøkni.

Hvørt á sín hátt eru verkini tulkingar av hugtakinum »landslag« í nútímans merking, sum á ymsar mátar seta sjónleyku á fatanir av, hvat landsløg kunnu vera her heima og úti í heimi.

Eisni síggjast meir at kalla avskeplaðar landslagsmyndir, sum seta spurnartekin við list og listafatanir í okkara tíð.

Av teimum 30 listafólkunum, sum eru við, er 17 kvinnur og 13 menn. Níggju av listafólkunum eru við á Ólavsøkuframsýningini fyrstu ferð.

Ólavsøkuframsýningin letur upp ólavsøkuaftan klokkan 14. Ólavsøkudagarnar báðar letur framsýningin aftur klokkan 20.

Framsýningin hongur uppi fram til 9. august.

